FJØLRIT
-røkir føroysk listarættindi

# Ársfrágreiðing • JAN 2020



Felagsmynd gjørd av luttakarunum á Stórfundinum á Hotel Føroyum 16.-18. septembur

# FJØLRIT

## - røkir føroysk listarættindi

Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.

Brúk merkir øll endurgeving - ljósriting, avriting, fjølriting, talgilding og onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniðið verkið er skapt ella er til taks.
Fjølrit hevur sum felagskapur onki sjálvstøðugt fíggjarligt endamál.

**Limafeløg**
Hesi feløg eru limir í Fjølrit og tað eru hesar listagreinar, Fjølrit umboðar:

- Rithøvundafelag Føroya
- Føroysk tónaskøld
- Føroysk myndlistafólk
- Føroyskir yrkisfotografar
- Føroysk bókaforløg
- Føroya miðlafólk

**Umboðsráðið**
Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið.

Umboðsráðið skal:

- gera av hvussu Fjølrit skal virka
- velja stjórnina
- hava eftirlit við arbeiði stjórnarinnar
- eftir uppskot frá stjórnin gera reglugerð um handfaring av viðurløgum.

**Lóg um upphavsrætt**
Fjølrit hevur loyvi frá Mentamálaráðnum at virka sum rættindafelagskapur, í samsvari við § 40 stk 1 í løgtingslóg um upphavsrætt.

**Stjórnin og daglig umsiting**
Stjórnin er mannað soleiðis:

- Atli K. Petersen, formaður
- Helle Thede Johansen, kassameistari
- Jonhard Mikkelsen, skrivari

Heidi Durhuus, umsitari og kt-mennari tekur sær av dagligu umsitingini.
Sigmund Poulsen er knýttur at Fjølritur sum løgfrøðiligur ráðgevi.
Jákup Samuelsen er bókhaldari.

Samband fæst við at senda teldupost til post@fjoelrit.fo ella ringja 23 86 00.

# Ársfrágreiðing

## til aðalfund Fjølrits 18.februar 2020

Farna árið hevur mest havt útgjald, hugburðs-broyting og ráðstevnu á dagsskránni. At slóða nýtt land, er eyðkent við at hava eina ætlan og at arbeiða miðvíst fram ímóti loysnum fyri, hvussu hon skal førast út í lívið. Nógvir spurningar hava verið hjá stjórnini at taka støðu til, sumt hava vit vent afturá fleiri ferðir, fyri at fáa loysnina at búnast.

Hóast varðin enn er tann sami: at tryggja burðadyggu ringrásina - eina skipan, ið tryggjar, at eitt virðiligt nýtslugjald kemur aftur til listafólk, tá ið verk teirra verður endurskapt og nýtt - so hevur tað ikki gingið so skjótt sum ætlað at fáa útgjald í lag. Men nú er gongd í.

Tann tøkniliga skipanin er miðvíst bygt upp, so tað í 2019 bar til at skráseta seg sum rætt-indahava, fáa útgoldið viðurlag frá avtaluni við KVF og Mentamálaráðnum og frá fyrnaðum peningi. Í útgjaldinum verður eisini atlit tikið til Taks.



Av heimasíðuni, har til ber at skráseta seg sum rættindahava

**Endurnýggja loyvi**

Eitt krav fyri at kunna virka sum felagskapur fyri rættindahavar er at hava loyvi frá Menta-málaráðnum. Loyvi kann bara verða givið 5 ár í senn. Hetta er ein eyka trygd fyri, at felag-skapurin heldur seg innan fyri lógarinnar karmar. Loyvi hjá Fjølrit varð til 19. mars 2019, og tí varð søkt um loyvi í 5 ár aftrat tann 12. februar 2019. Av tí at Mentamálaráðnum tørvaði eyka tíð at viðgera umsóknina varð loyvið fyribils longt til 1. apríl 2019. Síðan fekk Fjølrit loyvi galdandi til 31. mars 2024 treytað av, at
"Fjølrit fyri 1. apríl 2020 hevur sett í verk skipan, sum tryggjar, at viðurlag, sum felagskapurin krevur inn, verður avroknað við viðkomandi upphavsfólk, soleiðis sum ásett í § 41, stk. 1.", umframt tær vanligu treytirnar.

**Avtalur**

Beint eftir seinasta aðalfund varð avtalan við Klaksíkar kommunu undirskrivað, so eftir eru bara tvær komm-unur, sum hava noktað at gera avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum við teirri grundgeving, at einki verður avritað.

Í januar varð avtalan við Kringvarpið undirskrivað, og í apríl varð fyrsti skamturin útgoldin sambært teirri av-taluni. Í oktobur varð avtala undirskrivað við Barnabata

um at brúka vard verk til undirvísing og innanhýsis brúk.

Eingin millumlanda sáttmáli varð undirskrivaður, men fleiri samráðingar eru í gongd. Fjølrit vendi sær til CLA í Onglandi við fyrispurningi, sum fegin vilja gera A-avtalu.

Við A-avtalu verður viðurlag fyri brúk av útlendskum verkið í Føroyum útgoldin til rættindahavarafelagskapin í útlandinum. Og somuleiðis verður viðurlag fyri brúk av Føroyskum verkum latin til Fjølrit, at býta út.
Við B-avtalu verða pengarnir í landinum har brúki er farið fram.

Semja er at bíða 1 ella 2 ár, til skipanin hjá Fjølrit er farin at rigga av álvara.

Copydan tekst og node hevur boðað frá, at tey bara gera A avtalur nú, so tá ið avtalan við Copydan skal dagførast verður tað ein A avtala.

Felagskapir úr Ukraine, Georgia og Afrika hava sett seg í samband við Fjølrit um at gera avtalu. Hetta hevur givið stjórnini høvi til at tosa um, hvørjar treytir Fjølrit skal seta fyri at gera millumlandaavtalu, t.d. limaskap í IFRRO, og hvør avtalutekstur skal brúkast.

## Innkomin peningur

Í 2019 er peningur innkomin fyri aðru ferð frá stovnunum undir avtaluni við Mentamálaráðið. Gjaldið er ásett fyri ársverk og fulltíðarlesandi, og av tí at eitt sindur færri ársverk og fulltíðarlesandi vóru hetta skúlaárið, komu 954.258,45 kr inn fyri skúlaári 18/19 sammett við 1.02 mill fyri skúlaárið 17/18.

Avtalan við Kringvarpið er galdandi frá 2018, og er tí inngoldið bæði fyri alt 2018 og 3 kvartal av 2019 (tað fjórða kemur 31. jan 2020).

Rokningar vórðu fyri fyrstu ferð sendar kommununum fyri skúlaárið 2018/19. Talan er um 6987 fólkaskúlanæmingar á 200 kr, og eru higartil innkomnar 1.321.000 kr.

Mentamálaráðið viðurkendi, at avritan er farin fram í tíðarskeiðnum 2014-2017, sum rættindahavar ikki hava fingið pening fyri. Semja var um 200.000 kr pr ár. Fjølrit fekk beinanveg pening fyri 2014 og 2015, og løgmaður fór í løgtingið og fekk eykajáttan fyri 2016 og 8 mánaðar av 2017 (t.e fram til galdandi avtala varð undirskrivað), sostatt 333.333 kr, sum verða fluttar Fjølrit í januar 2020.

Innkomin peningur í 2019:

| | Mentamálaráðið | Kommunur | Kringvarpið |
|---|---|---|---|
| 2014 | 200.000 | | |
| 2015 | 200.000 | | |
| 2016 | 200.000 | | |
| 2017 | 133.333 | | |
| 2018 | 1.026.856[a] | | 412.220 |
| 2019 | 954.258 | 1.321.000 | 258.892[b] |

a: Innkomin í 2018
b: 3 kvartal av 2019 (4. kv verður útgoldið í feb 2020)

## Skráseta seg sum rættindahava

Tá ið Fjølrit skal rinda viðurløg, má Fjølrit tryggja sær at hava rætta persón/felag og hava upplýsingar sum p-tal/v-tal og kontonummar hjá viðkomandi. Av tí at viðurlag er roknað sum B-inntøka, skal Fjølrit lata upplýsingar til Taks um øll útgjøld, herundir p-tal/v-tal so persónurin/stovnurin er eyðmerktur.

Rættindahavar skráseta seg hjá Fjølrit, sum so hevur upplýsingarnar tøkar, um viðkomandi skal hava viðurlag útgoldið. Hetta krevur minni tíð og orku frá Fjølrit enn, um farið verður út at leita eftir viðkomandi. Raðfest er, heldur at

brúka ta tíð og orku til at skjalprógva brúk, gera avtalur, fáa í lag skipan, og sum heild seta upphavsrætt á dagsskránna í Føroyum. Tað varð møguligt at skráseta seg sum rættindahavi í mars og higartil eru 90 skrásetingar.

## Útgjald

Í 2019 var fyrstu ferð í 6 ár, at viðurløg vórðu goldin út frá Fjølrit til rættindahavar.

Umframt, at avtalur manglaðu, og at peningur ikki kom inn, so hevur orðingin í upphavsrættarlógini

> § 41. Viðurlag, sum felagsskapurin krevur inn, skal avroknast til viðkomandi upphavsmann.

verið ein stórur og ógviliga arbeiðskrevjandi bági í arbeiðnum.

Verður hugt at upphavsrættarlógum í Norðurlondum, so hava allar orðað seg á leið soleiðis:

> Felagskapurin ásetur í sínum viðtøkum, hvussu avroknast skal við upphavsfólk

Eisini í heimshøpi sær tað út til, at Føroyar eru einasta land við hesi serligu orðingini. Hetta kom fram, eftir at Fjølrit sendi fyrispurning til IFRRO (International Federation of Reproduction Rights Organisations) um málið.

Munurin er, at tann føroyska lógin í strangastu tulking staðfestir, at bara tann, sum verður brúktur, skal hava pengar og eingin annar. Fyri at lúka hetta krav, noyðast vit at vita nágreiniliga, hvør er brúktur, og hvussu nógv er brúkt.

Í eini avtalu við KVF er tað kravið gjørligt at lúka. KVF skal frammanundan hava ein lista yvir, hvat verður sent í hvørjari sending til egið brúk, so tað ber til, at gera ein lista yvir upplestur og senda Fjølrit fýra ferðir árliga. Fjølrit rindar síðan út til rættindahavarar (tey, sum hava skrásett seg, og hvørja ferð ein nýggjur skrásetur seg, verður hugt at, um viðkomandi eigur nakað til góðar). Tað var tískil eisini rímiliga skjótt at fáa skipan í gongd, so útgjaldingar kundu fara í gongd, tá ið fyrsta uppgerðin frá KVF kom. Av teimum innkomnu 375.000 krónunum fyri 2018 eru 177.400,00 kr goldnar út, og av teimum innkomnu 235.356,40 kr fyri 1.-3. kvartal í 2019 eru 113.080,80 kr goldnar út.

Úti í skúlunum er veruleikin ein annar. Tað er eisini ymiskt frá t.d. miðnámi til fólkaskúla til musikkskúla, hvussu nágreiniliga undirvísarar skulu skráseta tað, tey brúka. Í 2018 varð kannað, hvørjar mannagongdir eru, og hvat er lógarfest viðvíkjandi skráseting, og út frá tí verður roynt at skráseta frá miðnámi og Próvstovuni fyri skúlaárið 2017/18.

Mett verður, at umsitarin brúkti á leið 5 mánaðir at gera kanningina, har eisini skipan varð ment og frágreiðing skrivað.

Henda talva vísir, hvussu innkomnu pengarnir frá avtaluni við Mentamálaráðið eru býttir:

| | Krónur | % |
|---|---|---|
| **Inngoldið juli 2018** | **1.026.856** | **100** |
| **Umsitingarútreiðslur 1.jan-31.des 2018** | **580.313** | **56,51** |
| **Eftir til rættindahavar (bæði føroyskar og útlendskar) at rinda út** | **446.544** | **43,49** |
| harav rættindahavar í landi við B avtalu | 220.012 | 49,27 |
| harav rættindahavar í landi við ongari avtalu | 21.880 | 4,90 |
| harav føroyskir rættindahavar | 204.651 | 45,83 |

Teir føroysku rættindahavarar, sum komu fram í hesari kanningini fingu tillutað viðurlag í november, samantalt 102.325,58 kr, og eru

21.674,17 kr útgoldnar higartil (restin er til rættindahavar, sum ikki hava skrásett seg enn). Harumframt er avgjørt at lata somu upphædd, t.e. 102.325,58 kr út eftir umsókn, tí víst verður á, at kanningin fevnir ikki um øll sløg av undirvísing undir avtaluni. Eisini komu nógvir útlendskir rættindahavar fram í kanningini.

Peningurin til teir rættindahavar í londum, Fjølrit hevur B-avtalu við, verða eftir avtaluni verandi í Føroyum. Tá ið teir fyrnast eftir trimum árum, kunnu teir rindast út eftir reglugerðini grein 3 stk 4. Peningurin til rættindahavar í londum, Fjølrit ikki hevur avtalu við, verða standandi á kontu, um so er, at rættindahavi setur fram krav innan fyri 3 ár, tá ið hesin peningur eisini fyrnast.

Tað er ein støðugur spurningur, um umsitingarútreiðslurnar fyri at skráseta so neyvt eta ov nógv av innkomna peninginum, so minni verður eftir til rættindahavarnar. Tá ið Fjølrit eftir øllum at døma skal lúka harðastu treytirnar í heiminum og samstundis hevur eitt avmarkað inntøkugrundarlag (tal av íbúgvum í Føroyum) verður tað væntandi ógviliga torført at fáa umsitingargjaldið niðurum 20%.

Fleiri av grannalondunum hava júst við hesi grundgeving raðfest, at mest møguligur peningur kemur út til rættindahavar og so niðurraðfest, at tað nágreiniliga eru teir somu rættindahavar sum eru brúktir. Hetta letur teirra lóg upp fyri við, at avrokningarhátturin er skrivaður inn í viðtøkurnar.

**Útgjald eftir fyrning**

Í upphavsrættarlógini stendur:

> § 43. Viðurlag fyri nýtslu av vardum verki fyrnar 3 ár frá ársenda av tí árinum, tá ið verkið var nýtt.

Hetta letur upp fyri, at inngjald fyri brúk fyri 2016 ikki er bundið av grein 41. Á aðalfundinum 30. januar 2019 samtykti umboðsráðið reglugerð fyri útgjald av viðurløgum, herundir viðurløg, sum ikki kunnu verða býtt út. Ásett eru ymisk endamál,




Av heimasíðuni: fjoelrit.fo

peningurin kann brúkast til. Arbeitt hevur verið við at skipa eina mannagongd og ein frymil á heimasíðuni, har umsóknir kunnu sendast inn 2.-31. januar 2020 fyri at fáa útgoldið pening frá puljuni 2014 og 2015, áljóðandi 318.689,96 kr (sum er 2 x 200.000 kr, 20% drigið frá í umsiting og eitt krav frá rættindahava, sum kundi vísa á hansara tilfar var brúkt).

**Ráðstevnur**

Stjórnin hevði eisini í ár raðfest at fara á ráðstevnur fyri at læra meira um, hvat ið hendir á upphavsrættarøkinum og at styrkja sam-bondini við hini feløgini, bæði tey norður-lendsku og annars. Tað hevur eisini verið gott høvi hjá stjórnini og umsitaranum at verða meira samansjóðað og kjakast um evni viðvíkjandi Fjølrit.






Í Dublin

Ráðstevnur uttanlands vóru:
28.-29. mars: Statistikkmøde í Stokkhólm fyri norðurlendsku systurfeløgini. Heidi var við.
05.-06. juni: Evropiska ráðstevnan hjá IFRRO í Dublin, har Atli, Jonhard, Helle og Heidi vóru við.
05.-07. novembur: Aðalfundur og ráðstevna hjá IFRRO í Edinburgh, har Atli og Heidi vóru við.

Helle Thede Johansen gjørdi búmerki til ráðstevnuna, ið lýsti evni burðadygd og ringrásir

**Vertir fyri norðurlendska ráð-stevnu um upphavsrætt**

Arbeiðið at fyrireika ráðstevnuna hevur tikið nógv av arbeiðstíðini hjá umsit-aranum Heidi og hjá kassameistaranum Helle í 2019. Fyrireikingararbeiðið byrjaði so smátt í 2018 við



Navnaspjaldur við snóri gjørd á Verkstaðnum Vón, posi við fræ frá Skjólurtaættini og 6 ymisk fuglakort, ið luttakararnir vóru bólkað í.



at finna stað, gisting og ferðing. Heidi og Helle samstarvaðu væl og settu høg mál fyri skránna bæði fyri at sjóða fólk saman, hava viðkomandi innihald og leggja til rættis, so arbeiðslagið fór at vera gott.
Higartil hevur hvørt felag býtt út sína ársfrágreiðing á ráðstevnunum, og ógviliga ymist hevur verið, hvat ið frágreiðingin var um. Heidi hevur í 2019 ment ein frymil til eina samlaða Norðurlendska landrapport. Við hesum ber til at fáa eitt yvirlit yvir umstøðurnar á okkara virkisøki í Norðurlondum og at samanbera systur-feløgini til kjak og íblástur.
Visit Faroe Islands læt tilfar til marknaðarføring og bólkaarbeiði, og Tórshavnar kommuna bjóðaði til móttøku í Mul-lers pakkhúsi.
Ráðstevnan varð hildin á Hotel Føroyum 16.-17. septembur 2019. 60 fólk vóru á ráðstevnuni og av teimum 17 úr Føroyum.

**Talgildisbúgving**

Tað er vorðið týðuligt, at upphavsrættur hevur ein týdningarmiklan lut, hvussu fólk skulu bera seg at á talgildum miðlum. Við íblástri frá norðurlendsku systur-feløgunum hevur Fjølrit arbeitt við at seta talgildisbúgving á dags-skránna. Tað hevur verið nógv fundarvirksemi við Nám um at finna ein leist fyri, hvussu talgildis-búgving gerst ein partur av undirvísingini í fólka-skúlanum.

Eitt tiltak verður, at Fjølrit hevur ein bás til lærara-dagar í februar 2020.



Jukka Pekka Timonen heldur fyrilestur á Nád

Í sambandi við at norðurlendsku systur-feløgini vóru í Føroyum á ráðstevnu, skipaði Fjølrit fyri tveimum fyrilestrum á Námsvísindaligu deildini fyri 1 árs læraralesandi um upphavsrætt og tal-gildisbúgving. Annan fyrilesturin høvdu Hege Lunde frá Kopinor og Ilka Nagel frá Lærerhøskolen i Østfold. Tað var framløga um verkætlanina "det lille ekstra", ið sipar til, at lærarar ofta brúka verk í undirvísingini aftur at høvuðslæritilfarinum. Hin fyrilesturin helt Jukka Pekka Timonen úr Kopiosto. Tað var ein framløga um finska talgilda spælið um

upphavsrætt, Kopiraittila, og hvussu tað verður brúkt úr 1. flokki og upp til hægri lestur.

**Ætlanir 2020**

Stjórnin raðfestir at taka lut í hesum ráðstevnunum:

26.-27. marts: Statistikmøde í Oslo
apríl/mai: Norðurlendsk ráðstevna um upphavsrætt fyri rithøvundar og leikarafeløg í Oslo
25.-26. mai: Evropiska ráðstevnan hjá IFRRO í Oslo
24.-25. august: Norðurlendski stórfundurin í Íslandi

Umframt at hava ein bás til læraradagar er eisini ætlanin onkursvegna at vera til staðar til bókadagar í Norðurlandahúsinum í novembur.

Raðfest er at skipa útgjald av fyrnaðum peningi og kanna nýtsluna av vardum verkum í fólkaskúlum, musikkskúlum og kvøldskúlum, so útgoldið kann vera sambært avtaluni við kommunurnar.

Samstarvið við Mentamálaráðið um at dagføra upphavsrættarlógina skal halda fram. Ætlanin er at fáa slakað krøvini til skráseting og útgjald til "viðkomandi upphavsfólk", ella á annan hátt fáa skipa viðurskiftini soleiðis, at umsitingarparturin kann minka og ein størri partur av peninginum kann koma aftur til rættindahavar.

Arbeitt verður við at fáa fastan fyrilestur um upphavsrætt sum lið í talgildari búgving á Nád og at týða part av Kopitaittila til føroyskt.



Stjórnin í Dublin. Frá vinstru: Helle Thede Johansen, Atli K Petersen og Jonhard Mikkelsen.
Umsitarin, Heidi Durhuus tók myndina.

# Granskoðan

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

## Fjølrit

Postsmoga, 62, 110 Tórshavn

### Ársfrásøgn

### 2019

FRUMRIT

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 18/2-2020

Atli K. Petersen
Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2019** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Stjórnin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2019 hjá Fjølrit.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2019 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 14. februar 2020

**Stjórn**

| | | |
|---|---|---|
| Atli K. Petersen | Jonhard Mikkelsen | Helle Thede Johansen |
| formaður | skrivari | kassameistari |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðsluna í Fjølrit**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fjølrit fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, undir hesum nýttur roknskaparháttur. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2019 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 14. februar 2020

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Heini Thomsen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fjølrit<br>Postsmoga 62<br>110 Tórshavn | |
| | Heimasíða: | www.fjoelrit.fo |
| | V-tal: | 429198 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Stjórn** | Atli K. Petersen, formaður<br>Jonhard Mikkelsen, skrivari<br>Helle Thede Johansen, kassameistari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

# FJØLRIT

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Virksemið hjá Fjølriti er at útvega upplýsingar og mæla til tiltøk til frama fyri áhugamálini hjá rættindaeigarunum. At samskipa krøvini hjá limafeløgunum, samráðast og gera sáttmálar teirra vegna, at umsita og býta samsýningar og endurgjøld fyri at brúka upphavsrættarliga vard verk. At veita feløgum hjá útlendskum rættindaeigarum og móttaka frá teimum samsýningar og endurgjøld.

Fjølrit er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 fra 30. apríl 2015 um upphavsrætt (hereftir nevnd upphavsrættarlógin) og umboðar rættindahavarar í sambandi við øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting ella onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg í framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er/verður skapt ella er til taks.

Í løtuni eru hesi feløgini limir í Fjølrit: Rithøvundafelag Føroya, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki.

Fjølrit hevur sum felagsskapur einki fíggjarligt endamál.

# FJØLRIT

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Fjølrit er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Rakstrarroknskapurin

**Bruttoúrslit**
Bruttoúrslit umfatar nettosølu, aðrar rakstrarinntøkur og annan uttanhýsis kostnað.

**Vørunýtsla**
Vørunýtsla umfatar útgoldnan stuðul.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir og tap av áognarum.

**Starvsfólkakostnaðir**
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Fíggjarstøðan

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Skuld**
Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

FJØLRIT

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2019 kr. | 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | Nettoinntøka | 3.097.871 | 1.025 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 0 | 18 |
| | Útgoldin stuðul | -320.823 | 0 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -361.361 | -1.166 |
| | **Bruttoúrslit** | **2.415.687** | **-123** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -527.088 | -334 |
| | **Ársúrslit** | **1.888.599** | **-457** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 1.888.599 | 0 |
| Flutt frá fluttum úrsliti | 0 | -457 |
| **Býtt tilsamans** | **1.888.599** | **-457** |

# FJØLRIT

## Fíggjarstøða 31. desember

**OGN**

| Nota | | 2019 kr. | 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| 2 | Áogn | 424.305 | 751 |
| | Áogn tilsamans | 424.305 | 751 |
| | Tøkur peningur | 2.887.261 | 674 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **3.311.566** | **1.425** |
| | **OGN TILSAMANS** | **3.311.566** | **1.425** |

**SKYLDUR**

| Nota | | 2019 kr. | 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 3 | Flutt úrslit | 3.300.995 | 1.412 |
| | **Eginogn tilsamans** | **3.300.995** | **1.412** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 5.369 | 13 |
| | Onnur skuld | 5.202 | 0 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 10.571 | 13 |
| | **Skuld tilsamans** | **10.571** | **13** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **3.311.566** | **1.425** |

FJØLRIT

## Notur

| | | 2019 kr. | 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir | 502.249 | 316 |
| | Eftirlønir | 5.866 | 4 |
| | Onnur almenn gjøld | 18.973 | 14 |
| | | **527.088** | **334** |
| | Nevnd | 47.271 | 12 |
| **2.** | **Áogn** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 424.305 | 751 |
| | | **424.305** | **751** |
| **3.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 1.412.396 | 1.869 |
| | Flutt úrslit í árinum | 1.888.599 | -457 |
| | | **3.300.995** | **1.412** |

# Ársrokniskapur 2019

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | Tíðarskeiðið | Árið fyri |
|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | |
| 1021 | Søla av veitingum uttanlands | -25.763,76 | 0,00 |
| 1026 | Søla av veitingum til ES | -66.556,38 | 0,00 |
| 1030 | Søla til viðskiftafólk u/MVG | -2.334.158,45 | -1.045.532,45 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu við Kvf | -671.392,04 | 0,00 |
| | **Inntøkur samantalt** | **-3.097.870,63** | **-1.045.532,45** |
| | | | |
| | **Útreiðslur** | | |
| 2210 | Lønir | 448.254,00 | 299.989,96 |
| 2211 | Frítíðarpeningur & SH | 6.723,57 | 4.499,85 |
| 2213 | Nevndarsams. / B-samsýningar | 47.271,37 | 11.875,38 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 13.901,00 | 6.804,88 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 5.866,00 | 3.909,57 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 2.323,00 | 3.764,00 |
| 2230 | KM-pengar | 2.748,93 | 3.353,60 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 410,00 | 47.089,46 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 2.312,55 | 3.267,08 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 58.213,57 | 41.024,88 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 5.764,00 | 18.640,00 |
| 2811 | Tiltøk | 198.129,35 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga u/mvg | 12.000,00 | 19.240,07 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 79,90 | 1.162,90 |
| 3604 | Edv og skipanir | 5.924,13 | 4.200,38 |
| 3617 | Smáinnkeyp innkeyp (teldu, printari vm) | 95,00 | 19.995,00 |
| 3620 | Telefon | 3.402,00 | 2.415,31 |
| 3628 | Rentur og kostnaðir | 4.798,12 | 2.670,00 |
| 3640 | Grannskoðari | 11.875,00 | 14.375,00 |
| 3645 | Advokatur | 10.000,00 | 65.000,00 |
| 3647 | Bókhald | 42.000,00 | 0,00 |
| 3660 | Yrkisbókmentir v/MVG | 879,55 | 0,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir u/MVG | 972,28 | 375,00 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 6.312,45 | 6.310,54 |
| 3664 | Web-hotel og domeni | 879,28 | 350,00 |
| | **Útreiðslur samantalt** | **891.135,05** | **580.312,86** |
| | | | |
| | Rakstrarúrslit | -2.206.735,58 | -465.219,59 |

*Viðmerkingar: 2021 & 2026 er luttøkugjald fyri systurfeløgini til ráðstevnuna, ið Fjølrit var vertur fyri. 2811 eru útreiðslur og føroysku luttakarar á ráðstevnuna.*

| | | |
|---|---|---|
| Umsitingarpartur í % | 28,77 | 55,50 |

# Umsiting 2019

| Viðmerkingar | Útrokning av broytiligum umsitingargjaldi fyri 2019 | | |
|---|---|---|---|
| | **Umsitingarútreiðslur** | **2019** | **2018** |
| | Starvsfólkaútreiðslur samantaldar | 527.497,87 | 381.286,70 |
| *2019: frátrekt luttakaragjald frá systurfeløgunum* | Ferðing og marknaðarførsla samantalt | 172.099,33 | 62.931,96 |
| | Hølisútreiðslur samantaldar | 12.000,00 | 19.240,07 |
| *2018: frátrekt avskriving av MMR rokning* | Umsitingarútreiðslur samantaldar | 87.217,71 | 116.854,13 |
| | **Samantalt** | **798.814,91** | **580.312,86** |
| | | | |
| | **Sett av til umsiting (fast umsitingargjald)** | | |
| *avtalufest* | 10 % umsiting frá KVF (2018 og 3 kvartal av 2019) | 61.035,64 | 0,00 |
| *avgjørt á stjórnarfundi* | 20% av 400.000 kr frá MMR fyri 2014 og 2015 | 80.000,00 | 0,00 |
| | **Samantalt** | **141.035,64** | **0,00** |
| | | | |
| | **Eftir í umsitingargjald til kommunurnar og MMR** | 657.779,27 | 580.312,86 |
| | | | |
| | **Innkomi frá avtalum, ið umsiting skal roknast fyri** | | |
| *2019: harav 8000 kr ikki inngoldnar enn* | Mentamálaráðið | 945.803,45 | 1.026.856,95 |
| *2019: harav 76400 ikki innkomi enn* | Kommunurnar | 1.397.400,00 | 0,00 |
| | **Samantalt** | **2.343.203,45** | **1.026.856,95** |
| | | | |
| | **Umsitingargjald í prosentum** | **28,07** | **56,51** |
| | | | |
| | **Umsitingargjald í krónum frá avtalu** | | |
| | Mentamálaráðið | 265.504,01 | 580.312,86 |
| | Kommunurnar | 392.275,26 | 0,00 |
| | | | |
| | **At gjalda rættindahavum (før. og útl.) eftir avtalu** | | |
| | Mentamálaráðið | 680.299,44 | 446.544,09 |
| | Kommunurnar | 1.005.124,74 | 0,00 |

# Pengar inn og pengar út 2019

| Avtala | KVF | KVF | MMR | MMR | MMR (gml) | MMR (gml) | MMR (gml) | MMR (gml) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tíðarskeið | 2019 | 2018 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
| | (3 kvartalir) | | | | | | | |
| **Pengar inn** | | | | | | | | |
| Viðurløg | 235.356,40 | 375.000,00 | 680.299,44 | 446.544,09 | 106.666,40 | 160.000,00 | 160.000,00 | 160.000,00 |
| Umsitingargjald | 23536,04 | 37.220,00 | 265.504,01 | 580.312,86 | 26.666,60 | 40.000,00 | 40.000,00 | 40.000,00 |
| **Samlað upphædd** | **258.892,44** | **412.220,00** | **945.803,45** | **1.026.856,95** | **133.333,00** | **200.000,00** | **200.000,00** | **200.000,00** |
| | | | | | | | | |
| **Býti av viðurløgum** | | | | | | | | |
| **Krøv** | | | | | | | | |
| Krav frá rættindahava | | | | | | | 1.310,04 | |
| | | | | | | | | |
| **Føroyskir rættindahavar** | | | | | | | | |
| til at býta út frá skráseting | 235.356,40 | 375.000,00 | | 102.325,58 | | | | |
| at býta út eftir sannlíkum brúki | | | | 102.325,58 | | | | |
| **Samlað at býta út til føroyskar rættindahavar** | **258.892,44** | **375.000,00** | | **204.651,16** | | | | |
| | | | | | | | | |
| **Útlendskir rættindahavar** | | | | | | | | |
| kann ikki býtast út (B-avtala) | | | | 241.892,84 | | | | |
| kann ikki býtast út (land uttan avtalu) | | | | 21.880,66 | | | | |
| **Samlað kann ikki býtast út** | | | | **263.773,50** | | | | |
| | | | | | | | | |
| **Fyrnd** | | | | | | | | |
| Fyrnaðir | | | | | | 160.000,00 | 158.689,96 | 160.000,00 |
| ikki útgoldnir pengar fyrnast 31.des | 2022 | 2021 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 |
| | | | | | | | | |
| **Pengar út** | | | | | | | | |
| **Eru yvirførdir til rættindahava** | | | | | | | | |
| Eftir skráseting | 113.080,80 | 177.400,00 | | 21.674,17 | | | | |
| Eftir sannlíkum brúki | | | | | | | | |
| Eftir krav frá rættindahava | | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| **Standa á konto hjá Fjølrit við navni rættindahavans** | | | | | | | | |
| Rættindahavi hevur ikki skrásett seg | 145.811,64 | 197.600,00 | | 79.413,39 | | | | |
| Samlað upphædd er undir 300 kr | | | | 1.238,02 | | | | |

# Fíggjarætlan 2020

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | Fíggjarætlan 2020 | 2019 | Fíggjarætlan 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | | | |
| 1021 | Søla av veitingum uttanlands | | -25.763,76 | | 0,00 |
| 1026 | Søla av veitingum til ES | | -66.556,38 | | 0,00 |
| 1030 | Søla til viðskiftafólk u/MVG | -2.400.000,00 | -2.334.158,45 | -2.300.000,00 | -1.045.532,45 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu við Kvf | -300.000,00 | -671.392,04 | | 0,00 |
| | **Inntøkur samantaldar** | **-2.700.000,00** | **-3.097.870,63** | **-2.300.000,00** | **-1.045.532,45** |
| | **Útreiðslur** | | | | |
| 2210 | Lønir | 500.000,00 | 448.254,00 | 400.000,00 | 299.989,96 |
| 2211 | Frítíðarpeningur & SH | 7.500,00 | 6.723,57 | 6.000,00 | 4.499,85 |
| 2213 | Nevndarsams. / B-samsýningar | | 47.271,37 | 25.000,00 | 11.875,38 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 15.000,00 | 13.901,00 | 9.000,00 | 6.804,88 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 6.500,00 | 5.866,00 | 5.500,00 | 3.909,57 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 5.500,00 | 2.323,00 | 5.500,00 | 3.764,00 |
| 2230 | KM-penge | 3.000,00 | 2.748,93 | 2.000,00 | 3.353,60 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 10.000,00 | 410,00 | 40.000,00 | 47.089,46 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 3.000,00 | 2.312,55 | 3.000,00 | 3.267,08 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 50.000,00 | 58.213,57 | 40.000,00 | 41.024,88 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 50.000,00 | 5.764,00 | 50.000,00 | 18.640,00 |
| 2811 | Tiltøk | | 198.129,35 | | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga u/mvg | 12.000,00 | 12.000,00 | 12.000,00 | 19.240,07 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 2.000,00 | 79,90 | 2.000,00 | 1.162,90 |
| 3604 | Edv og skipanir | 7.500,00 | 5.924,13 | 4.000,00 | 4.200,38 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 5.000,00 | 95,00 | 5.000,00 | 19.995,00 |
| 3620 | Telefon | 4.000,00 | 3.402,00 | 4.800,00 | 2.415,31 |
| 3628 | Rentur og kostnaðir | 5.000,00 | 4.798,12 | 3.000,00 | 2.670,00 |
| 3640 | Grannskoðari | 12.000,00 | 11.875,00 | 8.000,00 | 14.375,00 |
| 3645 | Advokatur | 30.000,00 | 10.000,00 | 30.000,00 | 65.000,00 |
| 3647 | Bókhald | 25.000,00 | 42.000,00 | | 0,00 |
| 3660 | Yrkisbókmentir v/MVG | 500,00 | 879,55 | 500,00 | 0,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir u/MVG | 1.000,00 | 972,28 | | 375,00 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 6.500,00 | 6.312,45 | 6.500,00 | 6.310,54 |
| 3664 | Web-hotel og domeni | 1.000,00 | 879,28 | 1.000,00 | 350,00 |
| | **Útreiðslur samantaldar** | **762.000,00** | **891.135,05** | **662.800,00** | **580.312,86** |
| | Rakstrarúrslit | | -2.206.735,58 | | -465.219,59 |

*Viðmerkingar: 2013 gongur út, tí av røttum skulu nevndarsamsýningar skattast sum A-inntøka. Nevndarsamsýningar vera partur av 2210. 1042 var í 2019 fyri alt 2018 og 3 kvartal av 2019. Komandi ár verður tað 4. kvartal 2019 og 3 kvartal av 2020.*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingarpartur í % | 28,22 | 28,77 | 28,82 | 55,50 |

# Val 2020

Av sitandi stjórn stillaði Helle Thede Johansen (Rithøvundafelag Føroya) uppaftur og bleiv afturvald. Høgni Reistrup (Føroysk tónaskøld) og Niels Jákup Thomsen (Føroysk bókaforløg) stillaðu upp og vórðu valdir. Sum varalimur stillaði Uni Arge (Føroysk Miðlafólk) uppaftur og varð afturvaldur. Steintór Rasmussen (Rithøvundafelag Føroya) stillaði upp og bleiv valdur av Umboðsráðnum.

### Stjórnin

**Høgni Reistrup**
formaður

**Helle Thede Johansen**
næstforkvinna

**Niels Jákup Thomsen**
stjórnarlimur

**Uni Arge**
varalimur

**Steintór Rasmussen**
varalimur

| Umboðsráðið | Limafeløg |
|---|---|
| **Ole Wich** formaður | **Føroysk myndlistafólk** |
| **Kim Simonsen** næstformaður | **Rithøvundafelag Føroya** |
| **Jørgen Lützen** umboðsráðslimur | **Føroyskir yrkisfotografar** |
| **Kristian Blak** umboðsráðslimur | **Føroysk tónaskøld** |
| **Uni Arge** umboðsráðslimur | **Føroysk miðlafólk** |
| **Jonhard Mikkelsen** umboðsráðslimur | **Føroysk bókaforløg** |

### Grannskoðari

**Január**
Løggilt grannskoðanarvirki

-røkir føroysk listarættindi

**Fjølrit** • postsmoga 62 • FO-110 Tórshavn
www.fjoelrit.fo • tel + 298 238600 • post@fjoelrit.fo

**Útgevari:** Fjølrit
**Myndir:** Fjølrit, Helle Thede Johansen, Heidi Durhuus
**Sniðgivið og sett upp:** Heidi Durhuus og Helle Thede Johansen
**Útgávuár:** 2020

Endurnýtsla úr blaðnum er bert loyvt við skrivligum loyvi